# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Í átta ár hava vit havt ein forseta, sum er í lummanum hjá oljuvinnuni. Vit kunnu ikki fáa ein afturat nú*

*Barrack Obama*

# 27 pinkubørn deyð á sjúkrahúsi

**Teir seinastu fjúrtan dagarnar eru 27 pinkubørn deyð á einum turkiskum sjúkrahúsi**

Heisumálaráðið í Turkalandi hevur sett eina nevnd at kanna, hvussu tað ber til, at 27 pinkubørn eru deyð á einum sjúkrahúsi í høvuðsstaðnum Ankara teir seinastu fjúrtan dagarnar.

Sjúkrahúsið, sum eitur Zekai Tahir Burak, hevur eina av teimum størstu føðideildinunum í býnum.

Leiðslan á sjúkrahúsinum hevur sagt, at tey flestu børnini, sum doyðu, vóru fødd ov tíðliga, og at tey doyðu av ymsum orsøkum. Hinvegin hevur leiðslan avsannað øll tíðindi um, at børnini vóru vorðin sjúk orsakað av teimum vánaligu umstøðunum á sjúkrahúsinum.

Fakfelagið hjá starvsfólkunum á Zakai Tahir Burak-sjúkrahúsinum sigur harafturímóti, at pinkubørnini doyðu orsakað av skrivari viðgerð og vantandi reinføri á føðideildini.

*Sambært starvsfólkunum var vantandi reinføri á føðideildini ein orsøk til, at børnini doyðu*



# Hann er Che hjá Al-Qaida

**Týska fregnartænastan heldur, at Osama bin Laden er vorðin ein ímynd heldur enn ein virkin yvirgangsmaður**



*Osama bin Laden er ikki virkin longur, sigur týski fregnartænastuovastin*

*Mynd: Polfoto*

- Bin Laden er ikki við til at skipa fyri bumbuatsóknum hjá Al-Qaeda longur, sigur ovastin fyri teirri týsku fregnartænastuni, Ernst Uhrlau, í samrøðu við týska blaðið Bild.

Osama bin Laden hevur verið eftirlýstur um allan heimin sum maðurin, ið skipaði fyri atsóknini at World Trade Center í New York og Pentagon í Washington tann 11. september í 2001.

Ernst Uhrlau, sum stendur á odda fyri teirri týsku fregnartænastuni Bundesnachrichtendienst (BND), sigur við Bild, at hann hevur upplýsingar, sum benda á, at bin Laden ikki er við til at leggja álopsætlanir longur, men at hann hevur at kalla somu støðu fyri yvirgangsmenn, sum Che Guevara hevði fyri uppreistrarrørslur.

### Fjalir seg

Eins og fleiri yvirgangsserfrøðingar heldur Ernst Uhrlau, at Osama bin Laden fjalir seg framvegis í fjøllunum á markinum millum Afghanistan og Pakistan. Har kann hann eftir øllum at døma kenna seg tryggan, tí fólk hara eru til reiðar at verja hann og vilja tí ikki avdúka, hvar hann er staddur, hóast finningarlønin er risastór.

Týski fregnartænastuovastin vil ikki svara, tá Bild spyr, um tað var Al-Qaeda, sum skipaði fyri bumbuspreingingunum í Istanbul í síðstu viku, og sum kravdu 16 mannalív og særdu 154 fólk.

- Tað er sjálvandi ikki óhugsandi, og eg má siga, at atsóknirnar í Istanbul líktust ikki teimum, sum kurdiski arbeiðaraflokkurin plagar at skipa fyri. Framferðin bendir á, at tey, sum løgdu bumburnar, høvdu islamskar røtur, sigur Ernst Uhrlau.

# Vildi ikki svara øllum spurningunum

**Kate McCann sýtti fyri at svara 48 spurningum um tilburðin, tá dóttirin Madeleine hvarv**

Tað skrivar bretska blaðið The Sun, sum hevur havt høvi at kanna tað, sum portugisiska løgreglan fekk burturúr, tá hon avhoyrdi foreldrini hjá Madeleine McCann.

Blaðið skrivar, at Kate McCann noktaði at svara øllum spurningum, sum hon fekk, eftir at løgreglan hevði sagt, at hon og maðurin, Gerry, vóru undir illgruna í málinum. Foreldrini eru ikki undir illgruna longur, tí portugisiska løgreglan hevur lagt málið til víks. Gerry og Kate McCann hava kortini boðað frá, at tey fara at halda fram við sínum kanningum.

Í gjár fingu fjølmiðlafólk atgongd til tað umfatandi skjalatilfarið hjá portugisisku løgregluni í Madeleine-málinum. Talan er um næstan 30.000 síður.

Bretska sjónvarpið Sky vísti í gjár myndir av hotelkamarinum, haðani Madeleine McCann hvarv tann 3. mai í fjør.

## STUTT SAGT

### Helst ákærdur fyri trælahald

Ein embætismaður hjá eysturríkska ákæruvaldinum segði í gjár, at Josef Fritzl, sum hevði dóttir sína sum gísla í samfull 24 ár og fekk sjey børn við henni, verður helst ákærdur fyri trælahald. Síðani Josef Fritzl varð tikin, hevur ákæruvaldið arbeitt við at fyrireika rættarmálið ímóti honum, og sambært embætismanninum verður ákæruritið ætlandi liðugt í næsta mánað, og so kemur Josef Fritzl væntandi fyri rættin í desembur.

Eysturríkska løgreglan hevur fyrr upplýst, at Josef Fritzl hevur viðgingið, at hann hevði dóttir sína sitandi gísla í kjallaranum, at hann hevði misbrúkt hana kynsliga, og at hann hevði fingið sjey børn við henni. Eitt av børnunum doyði undir føðingini, og sagt verður, at Josef Fritzl koyrdi líkið í ein ovn og brendi tað.



*Josef Fritzl kemur fyri rættin í desembur*
*Mynd: Polfoto*

### Fagna Nelson Mandela

Í summar hava fólk ymsastaðni kring heimin hátíðarhildið 90 ára føðingardagin hjá fyrrverandi suðurafrikanska forsetanum Nelson Mandela, og fagnaðurin tykist ikki taka nakran enda, skrivar AP. Fyrradagin varð skipað fyri stórum hátíðarhaldi í heimlandinum, og millum gestirnar vóru Thabo Mbeki, forseti, og leiðarin í ANC-flokkinum, Jacob Zuma, sum eftir øllum at døma verður næsti forsetin í Suðurafrika. Báðir róstu Mandela fyri tað, sum hann hevði avrikað, men Mandela bað teir heldur fagna ANC, sum hevur stiðst fyri javnrættindum síðani stovnanina.

Nelson Mandela sat í fongsli til 1990, og fýra ár seinni varð hann valdur til forseta í Suðurafrika. Í 1998 mátti hann fara frá, tí eftir lógini kann forsetin ikki sita meiri enn tvey valskeið. Kanningar vístu, at hann hevði verið afturvaldur við stórum meiriluta, um hann hevði sloppið at stilla uppaftur.




*Nelson Mandela er nógv avhildin*
*Mynd: AP*